NSÍ og VB tóku seg inn á GÍ

Fótbóltur í 3. deild: GÍ er framvegis fremst, men eftir tapið sunnudagin, eru NSÍ og VB komin nærri oddaliðið

Um vikuskiftið var seinasta umfar í 3. deild hjá monnum fyri summarstøðgin spælt, og tað førdi við sær, at munurin millum GÍ, sum var seks stig á odda, og hini liðini minkaði.

Heilt óvæntað mátti oddaliðið lúta fyri Skála, sum hevur fingið vánalig úrslit seinastu umførini, men sum móti gøtumonnum gjørdu ein vørr aftur. Samstundis vunnu NSÍ og VB, sum eru nærmastu kappingarneytarnir hjá GÍ, sínar dystir sannførandi, og so minkaði munurin til trý stig.

Í botninum gerast støðan hjá Fram alsamt meira dapur, tí øll liðini omanfyri teir fáa javnan stig, og tey rýma longur og longur frá einsamalla botnliðnum, sum bert hevur fingið trý stig higartil. Næstniðasta liðið hevur heili 10 stig, og tætt er millum næstu liðini uppeftir. Spenningur verður neyvan um hvat liðið flytir beinleiðis niður, men kappingin verður hørd um at sleppa undan næstniðasta plássinum, sum førir við sær dyst móti næstovasta liðnum í 4. deild.

GÍ mátti lúta

Á Skála kom mest óvæntaða úrslitið hetta umfarið. Oddaliðið GÍ var á vitjan, og móti Skála, sum hevði góð úrslit at byrja, við, men sum tóktist vera uppstøðga seinastu umførini, vóru teir stórfavorittar.

Men tá Skála skoraði longu tá 15 sekund vóru farin, lá í luftini, at okkurt óvæntað fór at spyrjast burtur úr. GÍ gav bóltin upp, spældi aftureftir og mistu hann so til Boga Gregersen, sum gjørdi skjótt av og skoraði.

GÍ javnaði fyri hálvleik, tá Bárður Heinason stútaði bólt frá Tummasi Magnussen í málið. Gøtumenn høvdu mesta spælið, og teir høvdu eisini eina ørgrynnu av kjansum, men skálamenn vóru ídnir í verjupartinum, og kláraðu hvørjaferð at verja fyri. Og tá teir ikki kláraðu tað, syrgdi stólpin fyri, at einki mál kom, sum til dømis, tá Tummas Magnussen úr stuttari fjarðstøðu sendi í stólpan og út.

GÍ leið partvís undir, at vanliga álopsparið hjá teimum, Heini Heinason og Pól Andrias Jacobsen, vóru við á 1. deild, sum vann í Vágunum.

Í seinna hálvleiki kom eitt mál, og tað fekk heimaliðið. Tað kom longu tá 10 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki. GÍ royndi framvegis at trýsta fyri at koma fram um, og í einum mótálopi eydnaðist tað Jógvan Martin Hansen at skora sigursmálið. Hóast gøtumenn royndu at koma afturíaftur, eydnaðist tað teimum ikki, og teir taptu fyri fyrstu ferð í ár.

VB og NSÍ vunnu

Í Klaksvík spældu KÍ og VB, og her vóru tað gestirnir, sum rýmdu undan jóansøkuni og norður til Klaksvíkar at spæla, sum vunnu.

Í hálvleikinum var 2-0 til VB, eftir ein javnan dyst, har meira bit var í álopinum hjá VB. Í seinna hálvleiki minkaði Jákup Oluf á Lakjuni fyri KÍ, men tað gjørdist ikki til meira enn tað hjá KÍ, tí Rógvi Thorsteinsson legði VB fram um 3-1, og tá Egill Steintórsson so eftir ein solotúr skoraði til 4-1 var dysturin avgjørdur. Petur Óli Samuelsen staðfesti sigurin við málið til 5-1

Við sigrinum fóru vágbingar væl nøgdir suður aftur at halda jóansøku, og tað kundu teir gera trý stig aftanfyri oddaliðið í 3. deild.

Í Runavík vann NSÍ stórsigur á HB. Runavíkingar høvdu mesta spælið, hóast HB-liðið ikki var eiðasørt. Í fyrra hálvleiki hevði NSÍ nógvar royndir á HB-málið, men eydnan var ikki við teimum. Bert einaferð eydnaðist at fáa mál, og tað var tá Harry Knudsen skoraði eftir 19 minuttir.

Í seinna hálvleiki tók NSÍ rættiliga dik á seg og skoraði ikki færri enn átta ferðir. Frá 56. minutti til 61. minutt skoraðu teir tríggjar ferðir, og so var allur ivi um úrslitið beint av vegnum. Tað tænti ikki annað enn sum troyst, at Eyðun Samuelsen skoraði til 4-1, tí NSÍ helt fram við at gera mál. Seinastu tveir minuttirnar skoraðu teir tvey mál til endaliga úrslitið 9-1.

Sørvingar vunnu aftur

Í fjør noyddist SÍ at flyta niður úr 2. deild, og hóast teir hava vunnið fleiri dystir í ár, hava teir ikki megnað at tikið seg fram móti oddinum í 3. deild.

Seinastu tveir dystirnar hava teir tó klárað at vunnið við greiðum muni. Fyrst móti KÍ og nú í Havn móti botnliðnum Fram.

Úrslitið av dystinum var 5-0 til SÍ, og tað var í lagið, tí SÍ var væl betri. Hilmar Hansen legði fyri við málskjótingini og í seinna hálvleiki gjørdi hann tað til 4-0 og 5-0. Georg Haraldsen og Kaj á Stongunum skoraðu hvør sítt mál.

Seinasti dysturin hetta umfarið var í Fuglafirði, har sandingar, sum hava fingið stórt sjálvsálit seinnu umførini, vitjaðu hjá ÍF.

Eftir fyrru trý korterini var ÍF frammanfyri 2-0, og tað var í trá við leikgongdina. heimaliðið hevði meira spæl, og teir spældu seg eisini til kjansir. B71 dúvaði uppá kontraálop, og tað loysti seg serliga í seinna hálvleiki, tá ÍF lá langt frammi á vøllinum, og sandingar høvdu gott pláss at renna á.

Bogi Nón legði ÍF fram um 1-0, tá hann fluktaði tvørbólt frá Jón Magnussen í málið, og fyri hálvleik økti Jákup Baldvinsson til 2-0, tá hann í aðru atløgu sendi skot fram við B71-málverjanum.

Í seinna hálvleiki minkaði John Sørensen til 2-1, men so gav Jákup Baldvinsson, sum hevur verið nógv burturi við skaða í ár, aftur ÍF tvey máls leiðslu, tá hann skoraði eftir innlegg úr vinstru.

Jónsvein Thomsen, sum var bestur hjá gestunum, minkaði til 3-2, tá fáir minuttir restaðu, men nærri enn tað komu sandingar ikki.

Kappingin í 3. deild fer nú í summarfrí, og lagt verður aftur til brots 10. august, tá 11. umfar verður.

ek

Hagtølini í 3. deild

10. umfar, 28. & 29. juni
KÍ-VB 1-5 (0-2)
0-1: Palli Augustinussen
0-2: Egill Steintórsson
1-2: Jákup O.á Lakjuni
1-3: Rógvi Thorsteinsson
1-4: Egill Steintórsson
1-5: Petur Óli Samuelsen

NSÍ-HB 9-1 (1-0)
1-0: Harry Knudsen
2-0: Dánial Hansen
3-0: Fróði við Rætt
4-0: Harry Knudsen
4-1: Eyðun Samuelsen
5-1: Fróði við Rætt
6-1: Harry Knudsen
7-1: Petur M. Jacobsen (br.)
8-1: Dánial Hansen
9-1: Fróði við Rætt

ÍF-B71 3-1 (2-0)
1-0: Bogi Nón
2-0: Jákup Baldvinsson
2-1: John Sørensen
3-1: Jákup Baldvinsson
3-2: Jónsvein Thomsen

Skála-GÍ 2-1 (1-1)
1-0: Bogi Gregersen
1-1: Bárður Heinason
2-1: Jógvan Martin Hansen

Fram-SÍ 0-5 (0-2)
0-1: Hilmar Hansen
0-2: Georg Haraldsen
0-3: Kaj á Stongunum
0-4: Hilmar Hansen
0-5: Hilmar Hansen

Næstu dystirnir
10/8 Fram-KÍ
10/8 HB-VB
10/8 B71-NSÍ
10/8 GÍ-ÍF
10/8 SÍ-Skála

Støðan

1. GÍ	10	8-1-1	40-13	25
2. NSÍ	10	7-1-2	44-15	22
3. VB	10	7-1-2	39-14	22
4. SÍ	10	5-0-5	34-29	15
5. Skála	10	5-0-5	27-28	15
6. KÍ	10	4-0-6	28-42	12
7. HB	10	4-0-6	34-50	12
8. ÍF	10	3-2-5	20-32	11
9. B71	10	3-1-6	22-36	10
10. Fram	10	2-0-8	10-48	3

Málskjúttar

Egill Steintórsson, VB	(2) 14
Heini Heinason, GÍ	12
Pól Andreas Jacobsen, GÍ	12
Jákup Danielsen, HB	12
Hilmar Hansen, SÍ	(3) 10
Jón Nielsen, SÍ	10
Jack Jakobsen, NSÍ	9
Fróði við Rætt, NSÍ	(3) 9
Hartvig Joensen, HB	5
Hans Thomassen, HB	5
Jákup Helgi Egholm, ÍF	5
Arthur Johansen, Skála	5
Shønning Hentze, B71	4
Leivur Hansen, GÍ	4
Kim Petersen, GÍ	4
Hans Thomassen, HB	4
Jóannes Jakobsen, KÍ	4
Dánial Hansen, NSÍ	(2) 4
Regin Frederiksberg, NSÍ	4
Kaj á Stongum, SÍ	(1) 4
Ólavur Olsen, Skála	4
Mikael í Lágabø, VB	4
Sigmund Mikkelsen, VB	4
Palli Augustinussen, VB	(1) 4
Petur Petersen, B71	3
Mourits Viderø, B71	3
Sonni Djurhuus, Fram	3
Karl Johannesen, Fram	3
Jan Jacobsen, GÍ	3
Magni Jacobsen, GÍ	3
Eyðun á Lakjuni, ÍF	3
Mortan Thomsen, ÍF	3
Bárður Andreasen, KÍ	3
John Hansen, KÍ	3
Petur M. Jacobsen, NSÍ	(1) 3
Harry Knudsen, NSÍ	(3) 3
Mass Anthoniussen, Skála	3
Petur Óli Samuelsen, VB	(1) 3

Fara at sigla kring Suðuroynna

Fyri fyrstu ferð verður í summar skipað fyri sigling kring Suðuroynna. Hetta er ein kapping um at verða fyrstur runt um allan oynna, men samstundis eisini ein útferð við gomlum og nýggjum, stórum og smáum opnum føroyskum bátum. Bátarnir nýta segl og árar, men ikki motor. Høvuðssluttakararnir eru grindabátarnir í Vági, men aðrir bátar vera eisini.

Norður til Sandvíkar fríggjakvøldið

Byrjað verður á kappróðrarmálinum í Vági fríggjadagin kl. 18.00, har Valberg Thorsteinsson skjýtur startin. Farið verður av Vági, snarað verður norðureftir á Porkerisnesi, og bátarnir halda fram við eysturssíðuni á Suðuroynni norður til Sandvíkar. Hesin teinur er um 15 fjórðingar. Viðstreymur er, so um vindurin ikki er ov nógvur ímóti, tekur tað einar 4 til 6 tímar at sigla hendan teinin.

Málið á fyrsta teinum er innanvert kaiina í Sandvík. Eftir at bátarnir eru komnir á má verður farið niðan í Ranhøll, har móttøka verður við mati og drekka. Seinni um kvøldið verður hugni, føroyskur dangur og Steinbjørn B. Jacobsen siglur nøkur orð. Gist verður annars eisini í Ranhøll í Sandvík.

Av Sandvík leygardagin

Leygarmorgunin tíðliga kl. 7.00 ljóðar startskotið til tann langa teinin norður um Nípubakkan, suðru við vestursíðuni á oynni, suður um Sumbairenda og inn á Vágsfjørð. Hesin teinurin er um 35 fjórðingar, sum taka einar 10-12 tímar at sigla. henda ferðin setir stór krøv til áhaldni og góðan sjómansskap, tí er ætlanin at hava kunnugar menn við á hvørjum báti ella á hjálparbátinum, sum fylgja við, at geva ráð og vegleiða. Um teinurin gerst ov møtimikil ber til at seta upp ella leggja inn á Hvalbiareiði, í Fámjin, á Vágseiði ella í Sumba.

Johanna TG 326 og Norðlýsið eisini við

Í sambandi við Suðuroyar Siglingina 1997 gera sluppirnar Johanna TG 326 (nærri fæst at vita hjá Gudmundi Jacobsen á tel 73010) og Norðlýsið útferðir, so at ferðafólk kunnu síggja Suðuroynna frá øllum síðum, og annars fylgja við, hvussu langt bátarnir eru komnir.

Móttøka og veitsla í Vági

Komin til Vágs verður móttøku á keiini við heitari súpan, sangi og føroyskum dansi at geva hita aftur í kroppin og stimbra sjódálkaðu garparnar. Jógvan Krosslá, býráðsformaður, handar vinnandi bátunum steyp, heiðursbræv verður givið luttakandi bátunum til minnist um Suðuroyar Siglingina 97 og Hans Joensen í Líðin flytur fram røðu.

Aftaná ber til at bloyta bekksárar afturpartar og árubløðralógvar í svimjihylinum.

Um kvøldið verður stórt sjóball í Framtíðini. Fyltur lundi verður til matna umframt drekka eftir tørvi og tosta. Aftaná borðhaldið spælir harmonikkulið til dans út á ljósan morgun.

Trygdin

Viðvíkjandi trygdini er at siga, at í bátunum verður VHF'ur/fartelefon og øll kravd bjargingarútgerð, harumframt skulu allir luttakarar hava bjargingarvest. Maskinbátar og dekksbátar fylgja við allan vegin. Samband er við bjargingarfelagini í Suðuroynni, og Vaktar- og Bjargingartænastan hevur fingið fráboðan um tiltakið. Annars eigur hvør einstakur luttakari av hava sínar persónligu trygging, sum eisini er galdandi fyri slíkar útferðir.

Tilmelding

Bátar, sum ætla at taka lut, kunnu boða frá hja Bunyan Midjord á tel. 73631 og hjá Magnusi Jacobsen á tel 73469.

Einstaklingar, ið hava hug at vera við, kunnu melda seg á hesum tel. nr. Bátar norðanfjørðs kunnu melda til hjá Regini Debes á tel. 48587, og skulu luttakarar her boða frá, um gisting ynskist í Vági. Fyri bátar er útferðin ókeypis, meðan einstaklingar gjalda 50 krónur. Gitsing og veitsla verður annars eisini fyri rímuligan prís.

Fyrireikarar av tiltakinum eru Grindabátarnir í Vági, felagið Gerðabrúgv í Vági og áhugafelagið Seglið.

ek